UTTAN ÚR HEIMI

# Norsk oddagrein um aling kundi verið føroysk

**Týsdagin umrøddi norska blaðið Aftenposten støðuna í norsku alivinnuni í oddagreinini. Hóast trupulleikarnir í føroysku og norsku alivinnuni kanska ikki hava sama uppruna, kundi oddagreinin eins væl verið føroysk**

ALIVINNA
*Árni Joensen*



*Hóast trupulleikarnir í føroysku og norsku alivinnuni kanska ikki hava sama uppruna, kundi oddagreinin í norska blaðnum »Aftenposten« eins væl verið føroysk*
*Savnsmynd*

Oddagreinin í Aftenpsoten var soljóðandi:

»Ein stórur partur av norsku alivinnuni er komin út á eggina fíggjarliga. Laksaalararnir í Noregi skylda bankunum meiri enn 20 milliardir krónur, og fyri aðru ferð í tólv ár er vandi fyri, at bankarnir fara at yvirtaka vinnuna. Bankarnir hava longu sett risafyritøkuna Pan Fish undir umsiting, og tað sama er hent Midnor Group. Tað størsta alifelagið í Norðurnoregi, Dåfjord Laks, fór á húsagang í summar.

Nógv av teimum kreppuraktu feløgunum hava biðið tað almenna leggja uppí við millum annað at skerja fóðurkvoturnar. Tað hevði avmarkað framleiðsluna næsta ár, siga tey. Men tílík almenn inntriv hava ofta óætlaðar avleiðingar við sær. Tað versta er, at tey feløgini, sum framvegis klára seg og eru væl fyri fíggjarliga, missa ein kappingarfyrimun.

Alivinnan ásannar, at hon fyri ein stóran part hevur skyldina av kreppuni sjálv, tí spádómarnir um prís-hækking elvdu til ógrundað bjartskygni. Eisini teir stóru bankarnir viðganga at hava feilmett støðuna, og vit eiga at vera varin við at nýta almenn inntriv til at fjala út yvir vánaligar avgerðir og veika leiðslu. Sama hvussu harmiligt tað er, at feløg fara á húsagang, so skulu sera góðar grundgevingar til at regulera seg burtur úr trupulleikunum.

Tað, sum hevur størstan týdning, er, hvussu bankarnir og tey kreppuraktu feløgini sjálvi viðgera kreppuna. Aftan á mong ár við ovurframleiðslu og skeivum íløgum er tað greitt, at tað er neyðugt at umskipa vinnuna til færri og sterkari eindir. Skilagóðar avgerðir í bankunum høvdu eisini verið til hjálp tann rætta vegin.«

# Oljuvinna í Barentshavinum útsett

**Norska oljumálaráðið hevur gjørt av at útseta ætlanina at geva oljufeløgunum leitingarloyvi í Barentshavinum. Ístaðin skulu nýggj loyvi gevast við Lofoten**

OLJUVINNA
*Árni Joensen*

Fleiri av teimum stóru oljufeløgunum vilja sleppa at leita eftir olju og gassi í Norskahavinum, og harafturat hava norsku feløgini Statoil og Norsk Hydro áhuga í at sleppa í Barentshavið at leita.

Fyribils hava tey útlendsku oljufeløgini vunnið, tí nú hevur Einar Steensnæs, oljumálaráðharri, boðað frá, at eingin leiting verður í Barentshavinum enn, men at ætlanin ístaðin er at loyva leiting við Lofoten.

Politiski ráðgevin í oljumálaráðnum, Øyvind Håbrekke, sigur við Aftenposten, at tað ber ikki til at samanbera Barentshavið og Norskahavið. Í fyrra lagi er umhvørvið ikki tað sama, og í øðrum lagi eru fleiri møguleikar í Norskahavinum, og tí verður tað hildið skilabest at bíða við Barentshavinum, sigur hann.

Tað er tó ikki vist enn, at oljufeløgini sleppa at bora úti fyri Lofoten, sum er ein tann besta fiskileiðin við norsku strondina. Ætlanin hjá oljumálaráðnum er at lata feløgunum loyvi á tveimum leiðum við Nordland og Troms, men tað eru øll ikki líka fegin um. Í Norges Fiskarlag sigur kunningarstjórin, Tom Hanssen, at tey eru alt annað enn fegin um tíðindini úr oljumálaráðnum, og felagið fer eisini at fylgja væl við gongdini, sigur hann.

Seinasta norska útboðið var tað 18. í røðini, og ikki færri enn 14 oljufeløg hava søkt um leitingarloyvi. Millum teirra eru Agip, BP, Chevron Texaco, ConocoPhilips, Dong og norsku Hydro og Statoil. Ætlanin hjá oljumálaráðnum er at luta loyvini út á sumri næsta ár.

*Ætlanin hjá oljumálaráðnum er at luta loyvini, við Lofoten, út á sumri næsta ár*
*Savnsmynd*





# Seks ferðir »Cabaleum« á ovastevnu

**Skráin fyri stevnuna er fjølbroytt, og tiltøk eru bæði fyri børn og vaksin**

OVASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*



*Tað var sum »sild í tunnu« á ovastevnu í fjør, tá ið fólkið var mest.*
*Mynd: Poul Hansen*

Fara veðurgudarnir at skikka sær líka væl á ovastevnu í ár sum seinasta ár, eru øll útlit til, at stevnan, sum nú hevur 10 ár á baki, fer at eydnast til fulnar.

Undirtøkan, sum stevnan fekk í fjør, var størri enn nakrantíð, og umframt bátar í hópatali, sum leitaðu sær um fjørðin úr meginøkinum og aðrastaðni, flutti strandfaraskipið, Rytan, ikki færri en 2000 fólk um fjørðin.

Eftir fólkatalinum í Nólsoy, sum er undir 300, er eingin ivi um, at ovastevnan er best vitjaða stevnan í landinum – tó, at hon liggur eftir, at allar hinar stevnurnar hava verið, og fólk á »pappírinum« tískil áttu at verið stevnutroytt.

Vit hava hugt at eitt sindur at, hvat stevnuskráin hesaferð hevur at bjóða.

### »Cabaleum«

Lagt verður hart fyri, um vit so kunnu siga, tí longu fyrsta tiltak á skránni í kvøld er kabarettin, sum í ár hevur fingið heitið, »Cabaleum«. Fyrsta sýningin verður fyri børnum, og hon byrjar í Royndarhúsinum kl. 18.

Øll tey fyrstu tiltøkini, sum eru á skránni í kvøld, eru ætlað børnum. Samstundis, sum »Cabaleum« verður sýnd, verður tombola og skjótibreyt á Nýggjavegi, og seinni um kvøldið eisini hoppiborg, skreiðiborg, miniásni og mekaniskur tarvur í skúlagarðinum.

Í kvøld sleppa børnini eisini at dansa í tjaldinum til kl. 22.30.

Sjálv frumsýningin av kabarettini verður kl. 20 í kvøld, og kl. 23 fara nólsoyingar – saman við gestasangaranum, Anfinni - at spæla til dans í tjaldinum.

### Setan, regatta, svimjing og dansur

Leygardagin verður nógv á skránni, og hetta er dagurin, tá ið nógv flest fólk vitja stevnuna.

Setanin verður kl. 14, og í ár verður tað løgtingsmaðurin, Kaj Leo Johannesen, sum setir stevnuna, og Nólsoyar sangkór fer at syngja.

Kl. 15 leygardagin verða ymisku barnatiltøkini á Nýggjavegi og í skúlagarðinum uppafturtikin, og tá fáa børnini eisini høvi at lata seg tekna.

Onnur tiltøk, sum byrja leygardagin, eru loppumarknaður, 21-spæl og fiskibrunnur, sum øll verða í skúlanum og skúlagarðinum.

Væntandi koma teir fyrstu svimjararnir á mál í Nólsoy um 15.30-tíðina og regattabátarnir kl. 17.

»Cabaleum« er tvær reisur á skránni hendan dagin, ávikavist kl. 17.30 og kl. 19.30.

Barnadansur verður aftur leygarkvøldið og eftir felagssangin undir Mikkjalsveggi, sum byrjar kl. 22.00, verður dansur í tjaldinum á midnátt. Leygarkvøldið spælir bólkurin, Showmen, sum eru Kim, James, Jóhannus og Jens Marni.

### Sterkastu og fimastu menn og kvinnur…

Sunnudagurin – ella dagurin »eftir« – byrjar stillisliga við gudstænastu í Nólsoyar kirkju, har Bjarni Bæk prædikar.

Men longu kl. 15.30 kemur aftur meira »røringur« í; tá verður nevniliga kapping í skúlagarðinum um, hvør er sterkasti og fimasti maður og kvinna í bygdini.

Sunnudagin verða barnatiltøkini, sum vóru leygardagin, tikin uppaftur, og kl. 18 verður einasta sýningin hendan dagin av »Cabaleum«.

Seinasta tiltakið í stevnuskránni, er aftur kabarettin, sum verður sýnd fyri seinastu ferð mánakvøldið kl. 20.

# Nógvir skúlanæmingar hjálpa til á Kósini

**Hóast verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum gjørdist rættiliga drúgt, og fólk eftir verkfallið søgdu seg vilja at arbeiða í summar, eru tað kortini fleiri, sum vilja hava summarfrí um summarið. Tí er tað komið væl við hjá Kósini, at nógvir skúlaungdómar hava verið við til at havt virksemið gangandi, nú eingin steðgur bleiv í framleiðsluni**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Tað er komið væl við á Kósini í summar, at fleiri skúlaungdómar hava viljað tjent sær nakrar krónur í summarfrítíðini*

Kósin er eitt av teimum virkjum, sum plaga at leggja stilt nakrar vikur um summarið. Trý fylgjandi ár eru tey, sum arbeiða á virkinum, farin í summarfrí eina viku fyri ólavsøku og hava hildið frí til tvær vikur eftir ólavsøku.

Ætlanin var, at soleiðis skuldi eisini verða í ár, og hesum hevði leiðslan boðað frá. Men tá ið verkfallið gjørdist so drúgt, vórðu fólk eftir verkfallið spurd, um tey høvdu hug at arbeiða í summar, og her søgdu fleiri seg vera sinnað til tess. Tí avgjørdi leiðslan á Kósini ikki at leggja stilt í summar.

Á virkinum siga tey, at nógv fiskaarbeiði hevur verið, síðan verkfallið varð avblást, men framleiðsluorkan í summar hevur verið minni enn vanligt, tí so nógv fólk eru og hava verið í summarfrí.

- Tað hevur tí verið okkum ein stór hjálp, at nógvir skúlanæmingar hava tikið hond í við okkum í summar og hava viljað tjent sær nakrar krónur í frítíðini.

Fleiri enn 20 skúlanæmingar, bæði gentur og dreingir, hava arbeitt á Kósini í summar.

- Nøkur hava verið her áður, meðan onnur eru nýggj.

### Jaspis og Ametyst

Mánadagin landaðu partrolararnir, Jaspis og Ametyst, góð 200.000 pund av upsa á Kósini. Skipini høvdu roynt á Bill Baily, og á Kósini siga tey, at upsin var góður.

- Nú framleiðsluorkan á virkinum er minni enn vanligt, røkkur hesin fiskurin til meginpartin av vikuni.

Sum skilst, hevur Kósin annars ikki keypt tær stóru nøgdirnar á uppboðssølu í vikuni.

Hvussu komandi dagarnir fara at roynast á Kósini, er ilt at siga, men nøkur av línuskipunum, sum hava ligið seinastu tíðina, eru nú farin útaftur.

Klakkur og Pison fóru miðskeiðis í hesi vikuni, og Jógvan S er í løtuni á Føroya Banka.

Væntandi kemur Jógvan S aftur av túri mánadagin komandi.

### Pussa upp…

Á Kósini vita tey at siga, at nøkur línuskip hava ligið og pussað upp, og væntandi er gongd komin á aftur hjá teimum flestu, áðrenn langt um líður.

Fiskidagarnir munnu eisini fara at ganga undan, nú so lítið er eftir at hesum fiskiárinum.